## Kjak um fiskivinnu

Mikukvøldið bjóðar fiskirannsóknarstovan útróðramonnum og øllum, sum eru tengd at fiskivinnuni, og øðrum áhuganum, til fundar og kjak á Seglloftinum á Tvøroyri. Luttakarar verða: Hjalti í Jákupsstovu, Bogi Hansen og Petur Steingrund, allir embætismenn á Fiskirannsóknarstovuni og Jacob Vestergård, fiskimálaráðharri. Hentzar Hammer og Terji Nielsen spæla góðan tónleik, og kaffi og køkur verða at fáa. Eisini verður lutakast um fiskamerki við vinningi upp á Kr. 12.500,-. Øll eru vælkomin, sigur Fiskirannsóknarstovan.



## Eitraður babymatur

Heilsufrøðiliga Starvsstovan ger vart við, at donsku matvørumyndugleikarnir hava illgruna um, at babymatur í gløsum frá "Hipp banan og ferskenmos" møguliga er eitrað við botulismu. Vøran heldur sær til og við desember 2008 og inniheldur 125 g. Gløsini eru merkt við lotnummar: L35655. Brúkarin verður mæltur til at beina hesa vøru burtur. Illgrunin er íkomin, eftir at eitt 5 mánaðar gamalt barn er vorðið sjúkt av botulismu. Heilsufrøðiliga Starvsstovan heitir á fólk um at seta seg í samband við læknan, um børn, sum hava etið barnamatin, vísa sjúkueykenni við vamli, spýggju og leysum lívi. Enn er ógreitt, um vøran er seld í Føroyum.



*Barakkin var sett upp, sum ein fyribilsloysn í sekstiárunum, men tað verður ikki heilt enn, at seinastu fólkini fara úr henni, og eygnadeildin verður verandi í nøkur ár afturat*

# Óviss lagna

**Í gjár skuldu seinastu fólkini fara út úr barakkini við Landssjúkrahúsið. Men soleiðis bleiv ikki, og fólkini, ið arbeiða har, og tey, sum eru har, hava fingið at vita, at tey skulu út um eina viku, men soleiðis verður ikki. Sostatt vita hvørki arbeiðsfólk ella búfólk, hvat tey skulu gera um eina viku**

BARAKKIN
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað var ætlanin, at seinastu fólkini skuldu fara út úr barakkini við Landssjúkrahúsið tann. 8. desembur 2008, men í gjár vóru øll fólkini enn á deildini og har verða tey eisini í eina tíð framyvir.

- Mann hevur ikki møguleika at lata deildina aftur, so hon kemur at koyra í eina tíð afturat, sigur Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri. Hann leggur afturat, at talan er um sjúklingar, sum í veruleikanum eru útskrivaðir, men, at orsøkin til, at teir eru verandi, er, at pláss ikki er fyri teimum aðrastaðni.

- Ætlanin var at finna eina loysn saman við Nærverkinum, men tað er eisini trýst á teirra skipan, so fólkini vera verandi í eina tíð afturat, greiðir Allan Skaalum frá. Hann greiðir eisini frá, at tey royna at hava deildina opna, soleiðis, at tey ikki hava fólk á gongum.

### Ikki nøktandi

Tað, sum sambært Allani Skaalum er størsti trupulleikin, er, at hesi fólkini, sum í veruleikanum eru frískt, brúka miðlar hjá Landssjúkrahúsinum og tí á ein hátt forða øðrum sjúklingum at koma framat.

- Talan er um tíggju fólk á E2. Hesi upptaka í veruleikanum sengur, ið kundi verið nýttar til veruliga sjúklingar, men vit fáa ikki sett tey á dyr, tí onkustaðni skulu tey vera, sigur Allan Skaalum, sum heldur tað vera ein trupulleika, at sjúkrahúsið ikki kann fokusera heilt upp á sjúkar sjúklingar. Hann harmast eisini, at ongi verulig boð kunnu gevast arbeiðsfólki og fyrrverandi sjúklingar. Veruligu búfólkini fóru út í oktobur, so nú er bert talan um fyrrverandi sjúklingar, sum ikki er pláss fyri aðrastaðni.

### Eygnadeildin

Ætlanin er at ríva barakkina niður og at byggja annan bygning í staðin, men tað er ikki nakað, sjúkrahússtjórin sær fyri sær í nærmastu framtíð.

- Eygnadeildin verður verandi har í nøkur ár afturat. Vit mugu í hvussu so er hava hana verandi har, til møguleiki er fyri einari permanentari loysn í øðrum bygningi, sigur sjúkrahússtjórin.

Barakkin var tikin í nýtslu fyrst í tryssunum, og skuldi vera ein fyribilsloysn. Ætlanir hava verið frammi, um at gera sjúklingahotell, har barakkin stendur, men eftir øllum brøgdum verður tað ikki enn.



*Ætlanin hevur leingi verið at lata deildina E2 aftur, ið heldur til í barakkini við Landssjúkrahúsið, men tað verður ikki á hesum sinni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Sambært Ann Hovgaard, sjúkrasystir, er barakkin eitt gott pláss, bæði fyri starvsfólk og sjúklingar. Ikki tí umstøðurnar eru so góðar, men tí umhvørvið er so hugnaligt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Heimligt og hugnaligt umhvørvi

**Hóast ætlanin leingi hevur verið at lata E2, Barakkina, við landssjúkrahúsið aftur, so heldur Ann Hovgaard, sjúkrasystir, at tað hevur verið eitt gott arbeiðspláss, og tí harmast hon afturlatingina**

BARAKKIN
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tey hava pyntað til jólar. Nøkur av fólkunum hava verið har í 40 ár, og barakkin sjálv er eini 50 ára gomul.

- Tað er sjálvandi ikki tíðarhóskandi, men her hevur verið stak gott at vera, og tey sum hava verið her, hava eisini havt tað gott. Høvdu veggirnir bara kunna talað, so hevði mann kanska ikki rivið hetta niður, sigur Ann Hovgaard, sjúkrasystir, ið hevur arbeitt á E2 hjá Landssjúkrahúsinum síðan 1993.

### Long óvissa

Fyri tíð síðan, var ætlanin, at fólkini, ið búgva á E2 skuldu flyta út haðani. Tað var eisini ætlanin, at tað skuldi henda í gjár, men í hvørgum av førunum bleiv tað til nakað.

- Vit hava fingið at vita fleiri ferðir, at nú er liðugt, men so hava vit fingið boð, at vit skulu halda fram í eina tíð afturat. Tað seinasta vit hoyrdu var, at vit skulu halda fram í eina viku afturat, so kunningin hevur verið so sum so, sigur Ann Hovgaard, sum leggur afturat, at hon ikki lastar leiðsluni, og at tey, ið arbeiða har, hava fingið boðið annað starv, so skjótt sum E2 letur aftur.

### Ongar heimahjálpir

- Onkustaðni skulu fólkini vera. Tað eru ongar heimahjálpir, og fólkini hava tað gott her, so eg dugi í veruleikanum ikki at síggja, hví deildin skal lata aftur, greiðir Ann Hovgaard frá. Hon leggur afturat, at ætlanin so leingi hevur verið at lata deildina aftur, so nú bíða tey bara til tey eru liðug.